## Sunnudagsskúli byrjar í Glyvra kirkju

Nú sunnudagin verður á fyrsta sinni høvið hjá børnunum í bygdunum í nánd av Glyvrum at fara í sunnudagsskúla, samstundis sum foreldur teirra fara til gudstænastu í Glyvra kirkju. Kirkjuráðið hevur nevniliga tikið stig til at hava sunnudagsskúla í kirkjutíð. Skipanin verður hon, at børnini fara yvir í konfirmantastovuna undir 3. sálmi og hava sína egnu skrá har, við søgu, sangi, teksti og øðrum. Ætlanin er at prýða tann eina veggin í stovuni, soleiðis at børnini kunnu kenna tað fjálgt og vinarligt, meðan tey eru í sunnudagsskúla.

## Blái Krossur við nýggjum bútilboði

Síðan 2004 hevur Blái Krossur, saman við øðrum, arbeitt við at fáa til vega bútilboð. til heimleys, eitt sonevnt umsorganarheim. Talan er um fastan bústað til fólk, sum ongastaðni hava at búgva. Nú er umsíðir klárt er at fara undir arbeiðið. Almannastovan hevur játtað Bláa Krossi fígging til rakstur, og gongst eftir ætlan, letur heimið upp seint í heyst. Í fyrstu atløgu verður talan um at nýta hølir, sum Blái Krossur hevur tøk í løtuni. Eingi tøl eru yvir, hvussu nógv heimleys eru í Føroyum. Ein arbeiðsbólkur metti í 2005, at talan var um 20 persónar. Í hesum sambandi varð serliga hugsað um tey, sum vóru sjónsk í býarmyndini í Havn. Á umsorganarheiminum verður í fyrsta umfari pláss fyri 7 búfólkum.

# Nótaskip ruddar misskiljingar um hjáveiði burtur




**- Kanningarnar seinastu árini vísa, at hjáveiðan hjá uppisjóvarskipum hevur verið langt undir tey tvey prosentini, ið er mest loyvda hjáveiða sambært kunngerðini um veiðu eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi, og tað er heldur ikki rætt, at svartkjaftafiskiskapurin órógvar upsaleiðirnar**

HJÁVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Undir politisku viðgerðini av fiskidøgum vístu fleiri løgtingslimir á, at neyðugt er at hava betri eftirlit við hjáveiðini hjá føroysku og útlendsku svartkjaftaskipunum, sum fiska í føroyskum sjógvi.

Møgulig hjáveiða hjá uppisjóvarskipum hevur verið ein afturvendandi spurningur, sum reistur hevur verið í politiskum høpi og millum fiskimenn, sum eru í aðrari vinnu enn teirri pelagisku.

Ein av løgtingslimunum, sum mæltu til neyvari eftirlit við hjáveiðini hjá hesum skipum, var Jóhan Dahl, formaður í vinnunevnd løgtingsins.

Í sínum tilmæli um fiskidagar helt hann, at neyðugt er at økja um eftirlitið hjá Fiskiveiðieftirlitinum, og í hesum sambandi vísti hann serliga á møguligu hjáveiðina hjá uppisjóvarskipum og fremmandum skipum í føroyskum sjógvi.

- Samstarvið millum Fiskiveiðieftirlitið og Fiskirannsóknarstovuna eigur at verða styrkt, og neyðug játtan eigur í hesum sambandi at verða fingin til vega, segði Jóhan Dahl, løgtingsmaður.

### Avvísti hjáveiði

Í Sosialinum herfyri vísti ein skipari á uppisjóvarskipi á, at hjáveiða uppi í svartkjaftaveiðini hjá føroysku uppsjóvarskipunum er søga, sum hann tók til.

Skiparin á einum av okkara bestu uppisjóvarskipum segði, at føroysku skipini onga hjáveiði hava.

- Tað nógva av tí, sum gitt verður um hjáveiði hjá uppisjóvarskipum, er humbukk og tvætl. Eg vildi ynskt, at myndugleikarnir fyrst kundu funnið út av at sett eygleiðarar umborð hjá okkum, áðrenn teir sleingja um seg við pástandum – á tingi og í fjølmiðlum.

Skiparin vísti á, at ein stórur kassi kring Føroyar er bannaður fyri svartkjaftaveiði, eins og økir í ein útsynning úr Føroyum eisini eru tað.

- At kalla alt føroyska sjóøkið krevur rist í svartkjaftaveiði, og tað er slett ikki nóg væl kannað, hvønn mun henda ristin ger.

Skiparin helt, at tað er í fínasta lagi, at myndugleikarnir vilja verja og ansa eftir teimum dýraru fiskasløgunum.

- Men tað er óseriøst bara at sleingja okkurt út og mæla til krøv til uppisjóvarskip – fyri at geva ávísum monnum, ið kanska øvunda okkum í síni egnu neyð – eina tátu í munnin, sum skiparin tók til.

### Eingin trupulleiki

Nú hevur so eisini felagið Nótaskip gjørt vart við hesi viðurskifti og hevur sent út tíðindaskriv í sambandi við kjakið, sum frammi hevur verið um møguliga hjáveiði hjá uppisjóvarskipum.

Felagið vísir á, at undir viðgerðini í løgtinginum av uppskotinum um áseting av fiskidøgum vóru einstakir løgtingslimir av tí fatan, at svartkjaftaveiðan hjá uppisjóvarflotanum undir Føroyum hevur beinleiðis ávirkan á støðuna hjá botnfiskastovnunum undir Føroyum. Í álitinum hjá vinnunevndini varð eisini nevnt, at landsstýrismaðurin eigur at umhugsa at áseta krav um, at uppisjóvarflotin skal halda ávísa fjarstøðu frá tí veiðu, sum fer fram á botnfiskaleiðunum eftir upsa.

- Vit vilja gera vart, at tað er ein misskiljing, tá hildið verður, at hjáveiða er ein trupulleiki í svartkjaftafiskiskapinum

Felagið Nótaskip sigur, at Fiskiveiðieftirlitið ger kanningar av hjáveiðuni hjá svartkjaftaskipunum, bæði umborð á skipunum, og tá landað verður.

- Kanningarnar seinastu árini vísa, at hjáveiðan hevur verið langt undir tey tvey prosentini, ið er mest loyvda hjáveiða sambært kunngerðini um veiðu eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi.

Kanningarnar seinastu árini hava víst, at:

- Í 2005 var miðaltalið av hjáveiðu 0,90%
- Í 2006 var miðaltalið av hjáveiðu 0,35%
- Í 2007 var miðaltalið av hjáveiðu 1,25%

### Eygleiðarar umborð

Nótaskip vísir á, at Fiskiveiðieftirlitið eisini í 2008

# Nátatíðin er farin at halla

HEYST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nátatíðin er nú farin at halla, men enn eru kortini nakrir dagar eftir, har menn kunnu fáa væl av náta á sjónum, um veðrið heldur sær.

Í dag er ein góður dagur, og hugsandi er, at bátar fara at koma aftur til lands út á dagin við nógvum fugli.

Seinastu dagarnar hevur ikki viðrað nakað serligt.

Hann hevur ligið á landnyrðingi, sum er vánalig ættan eystanfyri og norðanfyri, har tann nógva veiðan fer fram.

Fitt av tungari aldu hevur verið í sjónum, men nú hann sigur skiftandi lot, er hugsandi, at sjógvurin fer at slætna eystanfyri.

Fyrr í vikuni var bæði vindur og regn, og tí hevur hendan vikan ikki roynst monnum so væl, sum teir kundu ynskt sær.

Í gjár vóru fáir bátar á nátaveiði, men Sosialurin frætti tó um ein bát, sum hevði fingið 170 fuglar norðanfyri.

Í dag og í morgin er væntandi, at líkindini eru og verða góð.

Tá ið komið er út í næstu viku, fara ungarnir, sum enn sita á rókini, at fækkast.



*Ein góður nátadagur norðanfyri. 300 fuglar eru í bátinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*